# Ulladukka

forsangaranum. At hugsa sær at man hevur gingið í so nógv ár uttan at vita tað.

Alexandur spurdi ein dagin, medan vit koyrdu bil; mamma, hvør var hasin Poul Harbour? Tá mátti eg koyra inn til síðuna sum eg flenti. Tey høvdu havt um Pearl Harbour í skúlanum. Ikki kann sigast at hann hevur lurtað væl eftir tá hann ikki visti at tad var ikki um ein mann sum æt Poul.

Higartil gongur tað nokkso gott við at skriva um býtt ting.

Ein dagin, tá eg akkurát hevði keypt ein gamlan gass-ovn, setti eg eina grýtu útá. Løtu seinni helt eg hon var komin uppá kók, og setti oyrað til grýtuna. Hugsaði ikki um livandi flammuna, so eldur kom í hárið. Ja, hatta gjørdi eg í hvussu er bara eina ferð. Næstu ferð, eg brendi hárið, skuldi tad so ikki vera tí eg gjørdi sama feil aftur. So eg lenaði meg niður móti manninum hjá mær í gjár, tí eg vildi mussa hann. Eldur kom í hárið, tí eg ikki varnaðist stearinljósið, sum stód á borðinum. So næstu ferð, eg skal brenna hárið verdur uppá ein 3. máta. Tað mundi endað galið í gjár. Hopi, tad bara eru eygnabrýrnar næstu ferð umishannað. Apropos eygnabrýr. Har er eisini ein býtt søga. Hevdi keypt mær eygnabrýr-og vippuliting fyri fyrstu ferð. Nú vildi eg eisini royna at hava sovorðnar flottar og vældefineraðar eygnabrýr sum allar hinar konurnar. At lesa eina leiðbeining til at lita eygnabrýr kundi eg ikki funnið uppá. Hvussu ringt kann tad vera, man smyr tað væl á og letur tað sita í ......hyggja í leiðbeining.....15 minuttir. Eg so gjørdi, smurdi nokk á so tað dekkaði ØLL hárini. Sá út sum hann sjálvur Croucho Marx. Ná, men liturin skuldi so vaskast av aftur. Tað vildi bara ikki av húðini! Croucho Marx hevdi fingið eina systur. Hevði tveir stórar, kolasvartar morsniglar í pannuni. Plagi ikki at flenna hart tá eg eri einsamøll, men hetta kvødið stóð eg leingi frammanfyri speglinum og flenti. Frida Kahlo go home! Fór til frisør at fáa tað av dagin eftir, kundi ikki vera millum fólk so løgin sá eg út.

Og lesi eg leiðbeiningar nú? Nei, tað tími eg ikki. Tí fyri tað mesta er tað óneyðugt. Man trýstir á hesar ymisku knapparnar og vupti, so riggar tað sum oftast. Sum ein kinesari segði um danskarar; Danskarar noyðast at lesa aftanfyri rísposan fyri at vita hvussu man kókar rís, tsk tsk.

Einaferð skuldi systur mín hava køkur við í skúla. Tað skuldi eg nokk orna saman vid henni. Vit vóru samdar um, at kornfleykskøkur var akkurát the thing. Eg keypti inn til tað – kornfleyks, rosinir, flormelis og Palmin. Problemið var at har var einki Palmin, so eg keypti eitt sum æt okkurt annað men var tað sama. Tad var bara ikki tað sama, funnu vit útav dagin eftir, tá systi longu hevði serverað køkurnar fyri floksfeløgunum. Tær høvdu ikki verið so populerar, køkurnar, tað vóru verri enn so øll børnini, sum yvirhøvur vildu HAVA eina. Fann so útav at eg hevdi keypt svínafeitt í staðin fyri Palmin. Ylakk. Svínafeitt! Grísakøkur. Ikki akkurát leskiligt. KornFLESK-køkur, hehe.

Vit læra av okkara feilum, sigst. Ja, tað skal eg halda. Eg havi lært nógv. Hevði eg vitað alt tað sum eg veit nú fyri 25 árum sídan, var eg ikki so býtt sum eg eri nú. Ella er tað umvent. Tad kann eisini sigast vid eitt sindur av eyðmýkt; var eg ikki so býtt fyrr, var eg enn býttari nú. ;)

Og nú fari eg út í hattar har samfelagid at gera okkurt nýtt býtt.

*Ulladukkan*

